

## Svínakrím á norskum gørðum

- Vit taka støðuna í álvara, og orsøkin er, at vit ongantíð áður hava staðfest krímið í norskum svínum. Tað sigur eftirlitsstjóri í norska Matvørueftirlitinum, Kristina Landsverk, við NRK. Síðsta vikukiftið varð staðfest, at eitt svín á garði í Nord-Trønderlag hevði fingið smittuna av einum húskalli, sum arbeiddi har. Síðan tók illgruni seg upp um, at smitta eisini er á einum garði í Hedmark, har svín hava fingið luftræsistrupulleikar og fepur. Visir tað seg, at royndirnar í Hedmark eisini eru positivar, verður svínakrím staðfest millum svín á gørðum í tveimum ymiskum økjum í Noregi. Hetta er ikki hent áður í Noregi, og tí tekur Matvørueftirlitið støðuna í stórum álvara.



*Tó at ráfiskanøgdin hjá Havsbrún higartil í ár bert táttar í 90.000 tons, er hetta tó meiri, enn tey høvdu væntað sær, tá útlitini vóru ringast*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Rávørunøgd í fríum falli

**Sum alternativ til svartkjaft og sild, hevur Havsbrún í Fuglafirði higartil í ár keypt eini 5.000 tons av fiskaslagnum, havgølti. Í fjør keypti virkið tilsamans 11.000 tons av hesum alternativa fiskaslagi**

ÍDNAÐARVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir at føroyska svartkjaftakvotan er minkað so nógv, hevur hetta rættiliga gingið útyvir ráfiskanøgdirnar hjá Havsbrún í Fuglafirði.

Virkið, sum áður tók ímóti 200.000 og 300.000 tonsum um árið, noyðist nú at klára seg við einum triðingi av hesum.

Á Havsbrún siga tey, at ráfiskanøgdirnar higartil í ár tátta í 90.000 tons, men vónirnar eru smáar um at røkka teimum 100.000 tonsunum tað, ið eftir er av hesum árinum.

Herfyri vóru tvey føroysk skip á Fuglafirði við sild.

Norðborg hevði 840 tons av ídnaðarsild og nakað av mjøli og lýsi, sum manningin framleiðir umborð.

Fagraberg var eisini á Fuglafirði herfyri við fullari last – ella út við 3.000 tonsum.

Veiðan hjá Fagrabergi var sild við íblanding av svartkjafti.

Seinastu tíðina hava eisini tvey írsk nótaskip landað havgølt í Fuglafirði. Tey fiska í ES-sjógvi og veiðan, tey higartil í ár hava lagt upp í Fuglafirði, er tilsamans 5.000 tons av hesum fiskaslagi.

Havgøltur er eitt alternativ til aðra rávøru, men framleiðslan úr hesum fiskaslagi er á byrjunarstigi, siga tey á Havsbrún.

Í fjør keypti Havsbrún út við 11.000 tons av havgølti.

Tað eru írsku systirskipini, Father McKee og Brendelen, sum serliga hava fiskað havgølt á leiðunum sunnanfyri Írland og niðri móti Ensku Kanalini.

Skipini hava roynt at funnið keyparar ymsastaðni, og Havsbrún í Fuglafiðri hevur víst fiskaslagnum áhuga.

Havgøltur er smáur fiskur. Er slagið gott, liggur støddin millum 10 og 13 cm., men er fiskurin smáur, er longdin einar 5-6 cm. Fiskurin minnir um kongafisk í skrædúni; hann er nakað hvassur, og tí er hann eisini ringur at fáa upp úr skipinum.

# Ísfiskatrolarar fáa ikki fulla last

**Um dagarnar hava týðilig tekin verið um, at upsaveiðan er minkað. Landingarnar í hesi vikuni vísa veruliga, at so er, tí ísfiskatrolarar fáa í løtuni ikki nær til fullan túr**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landa Polarhav og Stjørnan 280.000 pund av upsa í Saltangará. Skipini hava verið langan túr, og nú tey komu inn at landa, var lastin lítið meira enn hálvfull.

Í gjár landaðu Stelkur og Bakur í Saltangará. Teir høvdu 200.000 pund, og tað er heldur eingin rokveiða hjá hesum skipum, ið saman við Polarhavi og Stjørnuni annars plaga at roynast rættiliga væl.

Tveir aðrir ísfiskatrolarar landaðu eisini í Saltangará í gjár. Tað vóru Jaspis og Ametyst, sum høvdu 150.000 pund av upsa.

Í morgin landa Rókur og Lerkur, men tá Rás2 frætti í morgun, var ikki greitt, hvussu nógv skipini hava inni.

Upsaveiðan er munandi lakari nú, enn hon hevur verið í longri tíð.

Soleiðis var eisini um hesa tíðina í fjør, og tí verður vónað, at góði upsafiskiskapurin, sum ísfiskatrolararnir annars hava havt í longri tíð, fer at taka seg uppaftur.



*Tá tey skipini, sum vanliga roynast drúgvast í fiskiveiði, ikki fáa meiri enn hálva last av upsa, er hetta týðiligt tekin um, at veiðan er muandi lakari, enn hon hevur verið*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*